# Starvsfólk til starvsfólkadeildina á FT

"at læra uttan at hugsa er burturspilt arbeiði – at hugsa uttan at læra er vandamikið"

- Konfusius -



**Til starvsfólkadeild okkara søkja vit eftir einum fólki, sum saman við verandi manning skal menna fyritøkuna at taka ímóti teimum avbjóðingum á starvsfólkaøkinum, sum nútíðar og framtíðar marknaður og menning krevja.**

Á starvsfólkadeildini arbeiða í dag 3 fólk, sum taka sær av starvsfólkaviðurskiftunum í fyritøkuni - bæði fyristingarligum og menningarligum. Starvsfólkadeildin er virkin í tilgongdum og verkætlanum í fyritøkuni og arbeiðir harumframt við at menna framferðarhættir á ymiskum økjum.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har avbjóðandi uppgávur og menningarhugur eru í hásæti. Tann, ið settur verður, fær møguleika at seta sítt sjálvstøðuga merki á arbeiðið umframt at fáa samstarv við dugnalig starvsfólk.

**Arbeiðið umfatar:**

- Ráðgeving og coaching av starvsfólki og leiðarum
- At skipa fyri menningartiltøkum á leiðslu- og starvsfólkaøkinum
- Gerð og umsiting av innanhýsis framferðarhættum
- Handfaring av setanum og lønarviðurskiftum

**Vit ímynda okkum, at tann, ið sett/ur verður,**

- Hevur viðkomandi miðal ella hægri útbúgving.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt við ráðgevandi og undirvísingaruppgávum
- Hevur royndir við og kennir seg væl í samspæli við menniskju
- Hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- Hevur hugflog og áræði til at skipa fyri tiltøkum

Eisini má viðkomandi vera til reiðar til at útbúgva seg í mun til krøv og ynskir hjá Føroya Tele.

Setanarviðurskifti og løn vera ásett eftir avtalu.

Neyvari upplýsingar fáast við at venda sær til Ásvør Skaalum, starvsfólkaleiðara, tel. 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 14. november 2007 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
*ella*
starvsfolkadeildin@ft.fo

**Føroya Tele er samtak við móðurfelag, FT Net, FT Samskifti og Televarpinum. Í samtakinum eru 260 starvsfólk við sera fjølbroyttum útbúgvingum og royndum.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*





# Almenn ráðstevna

**Burðardygg vistferðavinna (sustainable ecotourism)**

**Leygardagin 10. november kl. 10.00 verður almenn ráðstevna í Norðurlandahúsinum um burðardygga vistferðavinnu.**

**Vit spyrja:** Hvussu menna vit vistferðavinnu í Føroyum, og hvørji sosial, fíggjarlig og umhvørvislig atlit skulu vit hava?

Fyrilestrarhaldarar verða m.a. Dr. John S. Hull og Carol Patterson úr Kanada, sum bæði hava drúgvar royndir í burðardyggari ferðavinnu og hava hildið óteljandi skeið og fyrilestrar um evnið. Harumframt hoyra vit um royndir, ið føroyingar sjálvir hava gjørt sær á økinum.

Teknið tykkum til ráðstevnuna á www.tourist.fo ella ringið til SamVit, tel. 30 69 00.

| | |
|---|---|
| 10.00-10.20 | Morgunmatur |
| 10.25-10.40 | Vælkomin v/ Elini Heinesen, stjóra á SamVit |
| 10.40-11.00 | Umhvørvisstovan |
| 11.00-12.00 | Menning av burðardyggari ferðavinnu v/ Dr. John S. Hull |
| 12.00-12.55 | Ábit |
| 13.00-13.20 | Vistferðavinna og burðardygg menning í lokalsamfelagnum v/ Bergmann Finnsson, Agenda 21 ráðgeva |
| 13.20-13.40 | Lívfrøðingur røðir um árin, ið ferðavinna hevur á náttúruna |
| 13.40-14.00 | Veitarasjónarmið v/ Randi Meitil, Faroe Trekking |
| 14.00-14.20 | Veitarasjónarmið v/ Magna Blástein, Blástein |
| 14.20-14.30 | Steðgur |
| 14.30-15.30 | Vistferðavinna og marknaðarføring v/ Carol Patterson |
| 15.30-17.00 | Kjak og spurningar |

SamVit
Faroe Islands Enterprise

REPROZ